


**Nr. 15** ***16. juli 2023*** **83. árg.**

# Eldvitni

*„Tá birtist honum eingil Harrans í eldsloga, sum steig upp úr miðjum tornarunni; og tá ið hann hugdi gjøllari, sá hann, at tornarunnurin stóð í ljósum loga, men brann tó ikki upp.“*
*2. Mós. 3,2.*

Tá ið stórir meistaraskapir sum OL byrja, verður eldurin kyndur, og hann brennur so leingi, sum teir olympisku leikirnir vara.

Tá ið eldurin brennur, hendir nakað, sum hevur stóran týdning. Gud talar gjøgnum eldin. Móses varð kallaður gjøgnum hin brennandi tornarunnin. 2. Mós. 3,2. Tornarunnurin brann og brann, men brendi ikki upp. Tornarunnurin vakti ongan ans, men eldurin gjørdi tornarunnin til eina óvanliga sjón.

Tað er, sum Gud sjálvur vil siga við Móses: „Soleiðis sum tornarunnurin brennur, soleiðis skal eldur mín brenna gjøgnum teg, og tú skalt vera eitt eldvitni fyri meg. Tí skalt tú fara til Fárao og leiða fólk mítt út úr Egyptalandi.” Mósesi tørvaði eina sterka uppliving og eitt sterkt kall fyri at taka ímóti avbjóðingini.

Tá ið Gud skuldi vísa, um hann var sannur ella ikki, um hann svaraði bønum ella ikki, var prógvið eldurin, sum kom niður av Himli. „Ákallið tit tá navn guds tykkara, og eg skal ákalla navn Harrans. Tann gudur, ið tá svarar við eldi, hann er Gud!“ Tá svaraði alt fólkið og segði: „Henda ætlanin er góð!“ 1. Kongb. 18,24. Gud svaraði við eldi, og tað varð opinberað, at eingir gudar eru til uttan Hann!

Tað var eldurin, sum vakti Móses, og sum boðaði frá, at okkurt týdningarmikið fór at henda. Tað var eldurin á fyrsta hvítusunnudegi, sum broytti lívið hjá lærusveinunum og fram-

tíð teirra. Bangnir og innanhoknir lærusveinar vórðu fullkomiliga broyttir. (Áps. 2,1–4). Eldtungur settu seg á hvønn einstakan teirra. Gud sendi eldin.

Endamálið við eldinum er at festa eld í okkum, soleiðis at vit brenna – men verða ikki útbrend. Endamálið er, at vit fáa útint tað, Harrin vil við lívi okkara. Tað er syrgiligt og álvarsligt, tá ið vit kristnu halda, at vit kunnu klára okkum uttan Guds eld. Vit eru smá og avmarkað. Eldurin er tendraður. Eldurin er sendur. Lat Heilaga Andan arbeiða ígjøgnum teg. Tá henda yvirnatúrlig ting, og tað verður opinberað, at Gud sanniliga er okkara millum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Tú ert frá tíðarinnar morgni!

Tað, at vit eru dýrabar fyri Gud, kemst av, at vit eru skapað í Guds mynd, skapað at hava felagsskap við Skapara og Faðir okkara.

Vit eru ikki skapað í skundi og illa umhugsað – men skapað í Guds mynd – og skapað at ganga saman við Gudi, sum tað var frá byrjanini: „Men tá ið Ádam og kona hans í kvøldarlotinum hoyrdu HARRAN GUD KOMA GANGANDI GJØGNUM ALDINGARÐIN, royndu tey at krógva seg fyri honum millum trøini í aldingarðinum. Tá kallaði Harrin Gud á Ádam og segði: „Hvar ert tú?“ (1. Mós. 3,8–9).

Gud gekk saman við Ádami og Evu í Edens urtagarði!

Vit eru skapað til tað; men syndafallið gjørdi ein bráðan og syrgiligan enda á tí gonguferðini. Ádam og Eva goymdu seg fyri Gudi; men Gud leitaði Ádam upp – og tað hevur Hann gjørt líka síðani. Tí **Gud hevur enn tann longsulin í sær at ganga saman við okkum**.

Í Luk. kap. 19 bjóðar tollarin Sakeus Jesusi at koma inn til eina máltíð hjá sær, tí hann, Sakeus, leitaði eftir einum nýggjum lívi. Fólk vóru ørg um hetta, tí tollarar vóru mettir at vera óreiðiligir, teir sviku og lumpaðu fólk. Men við hesum orðum segði Jesus, hví hann kom at vitja Sakeus: „Menniskjusonurin er komin **at leita upp** hitt farna og at **bjarga tí**.“ (v. 10).

**Tað, at tú ert so dýrabarur, kemst ikki av tínari útbúgving ella aldri, tínum kyni ella útsjónd. Tað kemst av tí, at Gud hevur skapað teg til felagsskap við SEG, at HANN og TÚ skulu ganga saman á hesi jørð – og á tí nýggju jørðini**.

Tú ert umtalaður í Orðinum á henda hátt: „Tí at tú hevur nýru míni gjørt, hevur meg vovið í móðurlívi! Eg tær lovi, tí á undurfullan hátt eg varð skaptur, undurfull verk tíni eru.“ (Sálm. 139,13–14).

Og skuldi hetta ikki verið nóg mikið at sannført okkum um Guds kærleika og okkara virði, lurta so eftir Ef. 1,4–5: „Áðrenn heimurin var skaptur, útvaldi hann okkum, so vit kunnu standa rein og fullkomin fyri ásjón hansara. Hann elskaði okkum, og tí ætlaði hann longu frammanundan, at vit skuldu hava ein serligan leiklut. Hann skuldi gera okkum til síni børn gjøgnum Kristus.“ N.S.

*Effie Campbell* umsetti.

# Veitst tú, at tú ert dýrabarur í eygum Harrans?

Eg taki uppaftur Sálm 116,15: „**Dýrt er tað í eygum Harrans, tá ið hini heilagu Hansara doyggja**.“ Hetta lyftið hevur verið dýrabart fyri mong kristin, sum upp gjøgnum tíðirnar hava liðið vegna trúgv sína – eisini blóðvitnisdeyðan. Tey vóru eyðmýkt og illa viðfarin og mett sum virðisleys. Men so talar Gud: „DÝRT ER TAÐ í EYGUM HARRANS, TÁ IÐ HINI HEILAGU HANSARA DOYGGJA!“

Vit hava tørv á at minna hvør annan á, at vit eru **dýrabar fyri Gud** – uttan mun til, hvat ið onnur – ella vit sjálv – halda. Tí tá ið deyði okkara er dýrabarur fyri Gud, so er tað, av tí at **vit eru dýrabar fyri Hann**. Og tá ið vit doyggja, hevur Gud ein felagsskap við okkum, sum helst er tættari, enn meðan vit liva her.

Tað eru ikki mong, sum lættliga síggja, at vit skuldu verið dýrabar fyri Gud. Vit hava jú svikið so mangan. Men okkara virði veldst ikki um, hvussu stendur til hjá okkum – men at GUD SÆR KRISTUS Í TÆR OG MÆR. „Síggið, hvussu miklan kærleika faðirin hevur sýnt okkum, at vit skulu verða kallað Guds børn; og tað eru vit.“ 1. Jóhs. 3,1.

Róm. 5,8: „Gud sýnir kærleika sín til okkara av tí, at Kristus doyði fyri okkum, meðan vit enn vóru syndarar.“ Gud hevur nú góðtikið okkum vegna tað, at **Kristus doyði fyri okkum**.

Jeremia 31,3: „Við ævigum kærleika havi eg elskað teg, tí vart tú leiddur av miskunn míni.“ Hetta er eitt lyfti til Ísrael – men sanniliga eisini eitt lyfti til tín:

*Ein ævigur kærleiki!*
*Ein óbroytandi kærleiki!*
*Gud er trúfastur móti tær!*
*Vilt tú ikki takka honum fyri tað?*

*Effie Campbell* umsetti.

# Vreiði Guds rakar ikki tey, sum eiga Jesus í hjartanum

*„Men so mongum, sum tóku ímóti honum, teimum gav hann mátt til at verða Guds børn, teimum, sum trúgva á navn hansara.“ Jóhs. 1,12.*

Róm.: „Tí at vreiði Guds verður opinberað av himni **yvir alt gudloysi**.“

Róm. 5,8–9: „Gud sýnir kærleika sín til okkara av tí, at Kristus doyði fyri okkum, meðan vit enn vóru syndarar, so mikið heldur skulu vit tá, nú vit eru rættvísgjørd við blóði hansara, verða **frelst við honum frá vreiðini**.“

1. Tess. 1,10: „… vænta son hansara frá himnum, sum hann reisti upp frá deyðum, Jesus, sum **frelsir okkum frá hini komandi vreiðini**.“

1. Tess. 5,9: „ Tí at **ikki** hevur Gud ætlað okkum **til vreiði**, men at ognast frelsu við harra várum Jesusi Kristi.“

*Effie Campbell.*

## Blaðmaðurin: „Verður friður?“

**Golda Meir (1898–1978):** „Nei, ikki so leingi sum arabar ikki elska børn síni meir, enn teir hata okkum, ísraelar!“
**Blaðmaðurin:** „Men Bíblian sigur: Vend hin kjálkan til.“
**Golda Meir:** „Ja, men neyðugt er, at tú ert á lívi, um tú skalt venda hin kjálkan til.“

*e.c.* ums.

---

Kærleikin er knýttur fastur í Sannleikan. Eg elski ikki Jesus hægri, enn eg elski Guds Orð.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 16** *30. juli 2023* **83. árg.**

# Hin eldtrygga bókin

Gherghina var ein ung gift kona í Rumenia, sum var so eydnusæl at fáa eina Bíbliu. Hetta var í kommunistatíðini. Hon var ógvuliga forvitin at lesa hesa nýggju bókina, og meðan hon royndi at lesa í henni, fekk hon størri og størri áhuga at granska hana. Tíverri hevði maður hennara, Nicu, eina heilt aðra støðu til bókina, og hansara illvilji førdi til ósemju hjúnanna millum, og at endanum sýtti hann henni yvirhøvur at lesa í henni. Hann ansaði gjølla eftir henni; men so títt og knapt hann var burturstaddur, helt Gherghina á at lesa í Bíbliuni.

Ein dagin kom Nicu fyrr heim enn vanligt og bleiv bilsin og spinnandi óður, tá ið hann sá konu sína sita og lesa ta bókina, sum fullkomiliga var forboðin. Í sínum illsinni tók hann bókina út úr hondum hennara, læt ovnin upp, har eldurin brann lystiliga og hitaði stovuna, blakaði bókina í hann og læt ovnshurðina aftur við einum braki.

Gherghina fór grátandi út úr stovuni, meðan hon hugsaði um, hvat nú mundi fara at henda. Eitt korter seinni kom hon aftur, og við táravátum eygum læt hon ovnshurðina upp fyri at síggja, um okkurt mundi vera eftir av tí dýrabaru bókini.

Bilsin varð hon, tí hon lá óskadd inni í eldinum, og meðan hon leitaði eftir einum klova at taka hana út, kom maður hennara enn líka spinnandi óður inn í stovuna. Hann sá beinanvegin ta opnu ovnshurðina og ta óskaddu Bíbliuna mitt inni í eldinum.

Hann varð heilt skelkaður av hesum undrinum og segði, at henda bókin var Guds bók, sum hevði myndugleika sjálvt yvir eldinum.

Nú fór hann út og segði øllum grannum sínum frá Guds bók, sum ikki brendi. Kona hansara fann so ein klova og tók Bíbliu sína aftur. Eins og teir tríggir ungu hebreararnir í eldsovninum hjá Nebukadnezari hekk ikki so frægt sum brendaroykur uppi í henni.

Hesin óvanligi tilburðurin skapti stóran áhuga har um vegir fyri sannleikanum í Skriftini og styrkti trúnna hjá Gherghinu eins væl og hjá Nicu upp á Guds leiðslu.

*Effie Campbell* umsetti.

# Gev okkum í dag okkara dagliga breyð

*„Men hann svaraði og segði: „Skrivað stendur: „Menniskjan livir ikki av breyði eina, men av hvørjum orði, ið gongur út av Guðs munni.““ Matt. 4,4.*

Gev tær far um, at hann sigur, „hvørjum orði“. Sumt av tí andaliga breyðinum, ið hann gevur okkum, er ein søtur biti, meðan annað er pínufult. Og okkum er tørvur á báðum. „Íspinna kristin“ velja sær bara tey skriftstøðini, sum fáa tey at kenna seg væl til passar. Úrslitið verður, at tey ikki menna teir andaligu vøddarnar, teimum tørvar, so tey kunnu verða sterk í vánaligum tíðum.

*e.c* ums.

# Víga teg til bøn

Eru vit greið um, at tað er einki, sum djevulin ræðist so illa sum bøn? Ringasta stríðið hjá honum er at halda okkum burtur frá bønini. Hann elskar at síggja okkum arbeiða „upp um bæði oyru“ – bara vit ikki biðja. Onkur hevur sagt tað soleiðis: „Satan flennir at okkara strevi, háðar okkara vísdóm, men skelvur, tá ið vit biðja.“ Alt hetta kenna vit – men biðja vit av sonnum? Um ikki, so kemur ósigurin, tapið sníkjandi í fótasporunum, uttan mun til hvussu nógva framgongd vit tykjast at hava, tá ið vit fara fetandi avstað.

Latið okkum ongantíð gloyma, at størsta tænastan, vit kunnu víga okkum til, bæði fyri Gudi og menniskjum, er bønin. Tí vit fáa útint nógv meir við bønum okkara enn við okkara gerningum. Bønin er almáttug. Hon kann útinna alt tað, sum Gud megnar. Tá ið vit biðja, virkar Gud. Fruktin av arbeiði okkara hevur sín uppruna í bønini – vegna bøn arbeiðaranna

ella teirra, sum halda upp heilagar hendur hansara vegna. Øll vita vit, hvussu vit skulu biðja; men kortini eru tað kanska fleiri okkara, sum tørva at siga við Meistaran, eins og lærusveinarnir í forðum: „Harri, lær okkum at biðja."

*„Ordets Trøst" – Effie Campbell* umsetti.

# Himmalin

Himmalin er eitt heilagt stað – staðið, har Gud dvølir. Bíblian lýsir vakurleikan og skreytið har. Himmalski staðurin er klæddur við reinum gulli, ja, sjálvt gøturnar eru steinsettar við sama glógvandi metali, sum er klárt sum glas. Tað eru tólv portur, og hvørt teirra er úr einari perlu. Múrurin um staðin er úr glæsiligum gimsteinum. Staðurin hevur hvørki brúk fyri sól ella mána, tí Harrans dýrd upplýsir hann, og lambið er ljós hansara. (Opb. 21,23).

Sjálvt um henda frágreiðingin er strálandi vøkur, so sigur Orðið kortini: „Tað, sum eyga ikki sá, og oyra ikki hoyrdi, og ikki kom upp í mannahjarta, tað sum Gud hevur tilbúgvið teimum, sum elska hann." 1. Kor. 2,9.

Hetta vakra staðið er Guds bústaður, har Hann saman við sínum heilagu skal liva í endaleys ár. Tað er ikki neyðugt hjá nøkrum at standa uttanfyri, tí loysigjaldið er goldið fyri øll, so at ein og hvør, sum av sonnum og heilhugaður angrar syndir sínar og bjóðar Jesusi inn í hjartað, verður frelstur.

*Effie Campbell* umsetti.

# Vit eru rík

*„… faðirinum, sum gjørdi okkum dúgligar at fáa part í arvaluti teirra heilagu í ljósinum, hann sum bjargaði okkum út úr valdi myrkursins og flutti okkum inn í ríki elskaða sonar síns." Kol. 1,12–13.*

Tað verður sagt frá limunum í einari familju, sum var flutt úr einari lítlari íbúð í eini nýggj, stór og nýmótans hús, at tey næstan ikki fingu seg at trúgva, at alt hetta nýggja av sonnum var teirra. Tey kundu ikki annað enn sammeta við tað, tey vóru flutt úr, og yngsti sonurin rann bilsin úr einum rúmi aftur í annað og rópti: „Pápi! Eiga vit av sonnum alt hetta?"

Eru vit av sonnum vorðin var við, hvat tað í øllum sínum stórleika inniber, at vit hava fingið part í arvaluti teirra heilagu í

ljósinum? Hava vit, eftir at vit eru vorðin fríað út úr myrkursins valdi, tikið okkum stundir at gingið rúm úr rúmi í Guds orði fyri at siga takk fyri tey mongu lyfti og fyrijáttanir, sum allar hava sít „ja“ í Jesusi Kristi? (2. Kor. 1,20). Hava vit í bilsni lyft eygu okkara upp móti himli og spurt: „Pápi! Eigi eg av sonnum alt hetta?“ Og hava vit í trúgv og við lovprísan sagt takk, tá ið hann svarar: „Ja, barn mítt! Alt mítt er títt.“ Um ikki, so latum okkum seta okkum still niður og byrja at telja Guds mongu gávur og siga honum takk fyri tær.

*Effie Campbell* umsetti.

# At flyta

At flyta her í tíðini kann vera bæði stríggið og strevið, men hugsa um, tá ið tíðin er av, og tú skalt flyta upp til hin stóra hvíta skaran! Har fert tú at møta einglakórinum, og tú fert at hitta hann, sum bæði verður kallaður Orðið, Jesus Kristus og Guds Lamb. Tá ert tú komin heim med alla og ert saman við tínum kæru. Haðani fer tær ongantíð at leingjast, tí har skalt tú altíð vera.

**Ert tú til reiðar at flyta?**

*Effie Campbell* umsetti.

---

Fíggindin vendir sínum álopum móti heimunum, tí familjan stendur Guds hjarta næst. Fíggindin fær menn at gevast at elska konur sínar, hann er orsøkin til friðloysi og upploysing, og hann fær børn og foreldur at hata hvørt annað.

*e.c.* ums.

---

Tá ið tú ert vorðið eitt Guds barn, fert tú heilt natúrliga at fáa ein vaksandi áhuga fyri Bíbliuni. Hon er jú boðskapurin til tín frá tínum himmalska Faðir.

*e.c.* ums.

---

Jesus er bót fyri syndir okkara, ja, ikki bara fyri okkara, men fyri tær hjá øllum heiminum. Tað ger, at vit mugu líta at øðrum menniskjum við øðrvísi eygum. Golgataverkið varð gjørt fyri øll. Frá tíðarinnar morgni hevur Gud ynskt samfelag við teg.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74